# Vár Berghamar Jacobsen



*Hvussu heldur tú jól?*
– Eg fari at halda jól saman við familjuni heima hjá foreldrunum. 1. jóladag saman við verfamiljuni. Og 2. jóladag verða vit heima hjá okkum saman við familjunum og teimum, sum leggjast afturat.

*Hvat etir tú á jólum?*
– Jólaaftan stendur dunna – helst føroysk og vistfrøðilig – (og viðhvørt eisini gás) á matskránni, og Ris a´la mande omaná. 1. jóladag er eitt sindur ymiskt. 2. jóladag er føroyskt skerpikjøt, sum er hitað í ovninum, við nýkókaðum eplum og salti eitt must.

*Hvat er tað besta við jólum?*
Tað er at vera saman við skyldfólki og vinum – helst børnum, eta gott, dansa og syngja um jólatræið – angin av jólum – síggja børnini pakka upp. Og so dámar mær tann hátíðarliga dámin, sum tað er at fara til jólagudstænastu. Viðhvørt havi eg eisini verið til midnáttarmessu hjá Katolikkunum.

*Hevur tú hildið jól uttanlands?*
– Ja, tað havi eg gjørt fleiri ferðir. Fyrstu ferð var í Los Angeles, í nógvum hitastigum millum fólk í svimjuklæðum á strondini ella fólk á rulliskoytum, og við handlum fullum av jólatrøum við kunstigum kava: "I´m dreaming of a white Christmas" :) Og við urtagørðum í fagrasta blóma prýddir av stórum trøum við búnum appelsinum og sitrónum, og alskins vøkrum blómum. Eg búði hjá eini katólskari, meksikanskari familju, so jólini byrjaðu ikki fyrrenn 1. jóladag. Tá fóru vit til eina katólska Gudstænastu í eini stórari kirkju, eg hevði ongantíð á ævini sæð so stóra kirkju og so nógv fólk í kirkju, har var roykilsi, og prestar og tænarar og kórsangur, tað var ótrúliga hugtakandi. Aftaná gudstænastuni fóru vit "heim" at eta jóladøgurðan, sum var tortillas ella var tað encheladas. Men tá eg skuldi ringja heim via "Operator", og tey søgdu mær, at Føroyar ikki vóru til, var tað ikki so stuttligt longur. Síðani havi eg hildið jól í Århus í Jægergårdsgade 140 sjey ár á rað.

*Hvat ynskir tú tær í jólagávu?*
Eg ynski mær eini góð jól, eg ynski kavajól, og at øll hava tað gott. Og annars – ja, ein "Swiss Ball" (stødd 65), vøttir og lingeri frá Siri.



















